# Spart orku fyri næsta eina millión



*Hanni Olsen og Kristian Tavsen, skúlatænarar í Sørvági, hava grund til at fegnast. Í Sørvágs skúla hava tey spart eina lítla millión krónur í orku seinastu 12 árini*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Í Sørvágs skúla kunnu tey vísa á, at seinastu 12 árini hava tey spart fyri meira enn 800.000,- kronur í olju- og elorku**

ORKUSPARING
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Tey hava spart pengar í Sørvágs Skúla seinastu árini. Nógvar pengar. Ikki færri enn 824.842,- krónur høvdu havt verið brúktar fleiri til el og olju, um ikki ein íløga upp á hálvtannaðhundraðtúsund krónur varð gjørd í 1991.

Tíðliga í 1991 fekk Sørvágs skúli eitt teppi, sum lagt varð oman á svimjihylin, tá hann ikki varð brúktur, greiðir Hanni Olsen, skúlatænari frá. Hetta skuldi gera, at hitin, sum annars dampaði úr hylinum, eitt nú um náttina, varð verandi í vatninum.

Úrslitið lat ikki bíða eftir sær, sigur hann. Skúlatænararnir høvdu framman undan fylgt við, hvussu til stóð við oljunýtsluni. Og eftir at teppið varð lagt á, »kavaði« nýtslan í hylinum. Í februar 1991, tá teppið varð keypt, var oljunýtslan 8.006 litrar. Men longu í mars var hon niðri á 6.572 litrum.. Neyvu tølini eru løtt at finna fram til, tí liturmálari er settur á tilføringsrørið til oljufðringina, og skrivað verður trúliga upp á álmanakkan á vegginum, hvønn morgun fyrsta skúlatænararnir møta til arbeiðis.

Tað stóra talið, teir eru komnir fram til, greiðir Hanni Olsen frá er roknað sum eitt meðaltal í mun til ta nøtslu, sum var árini frammanundan teppinum, og sum hevði hildið fram, um tað ikki varð lagt á.

Men ikki bara olja er spard í Sørvágs skúla hesi árini. Eisini el- nýslan er minkað munandi, greiðir skúlatænarin frá. Tí eisini í 1991 varð gjørt av at skifta vanligu perurnar um við spariperur. Og eisini har er sparingin heilt stór. Ikki færri enn 61.584 kilowattímar hava tey spart hesi árini.

Tey høvdu roknað við at skula skifta umleið 40 perur um árið. Men har fingu tey ein eykavinning, sum vil nakað, sigur skúlatænarin. Tí bara níggju perur, alt í alt, hevur verið neyðugt at skift øll hesi árini.

Teppið í svimjihylinum hevur eisini gjørt, at motorarnir, sum reka ventilatiónsskipanina í skúlanum, heldur ikki eru so nógv í gongd, sum teir vóru áðrenn teppið varð lagt á. Eisini har er spart munandi. Tilsamans 52.752 kilowattímar.

— Alt í alt er orkusparingin í krónum hesi 12 árini heilar 824.842,- krónur, sigur Hanni Olsen. Tað er 68.736,- krónur um árið.

Sjálvandi skal roknast við íløguni til teppið og spariperur. Tann íløgan varð samlað 180.000,- krónur. Men kortini loypa so góðar 644.000,- krónur av hesi árini, vísir hann á.

Sørvág skúli skifti í fjør vindeygu fyri 309.000,- krøonur. Eisini tey fara at virka orkusparandi, nú termorútar eru komnir í staðin fyri gomlu vindeyguni, sum vórðu sett í, tá skúlin varð bygdur í 1957. Einar 7.000 litrar árliga, meta tey, at tann sparingin kann gerast til.

— Men við hesi stóru sparingini, vit hava havt, kunnu vit gott siga, at vindeyguni hava vit fingið ókeypis, sigur skúlatænarin. Og hann heldur fram, at tað ber eisini til at siga, at nýggi tilbygningurin, sum varð liðugur í 1989, ongan litur av olju hevur brúkt.

| 1988 | 1989 | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10.250 | 11.213 | 11.181 | 9.587 | 7.595 | 7.967 | 8.379 | 8.288 | 7.119 | 7.623 | 7.545 | 8.664 | 9.191 | 8.681 | 8.685 |
| 9.610 | 10.850 | 9.263 | 8.006 | 7.394 | 6.953 | 6.811 | 6.777 | 7.121 | 7.767 | 6.898 | 9.158 | 9.022 | 9.184 | 8.165 |
| 10.755 | 12.420 | 11.007 | 6.572 | 7.601 | 7.501 | 7.118 | 8.062 | 7.336 | 7.156 | 8.053 | 8.543 | 9.216 | 8.970 | 8.134 |
| 8.401 | 9.930 | 8.744 | 6.786 | 5.484 | 5.995 | 5.400 | 5.580 | 5.183 | 6.749 | 5.903 | 7.243 | 6.747 | 6.382 | 6.155 |
| 6.978 | 10.201 | 6.869 | 5.525 | 5.193 | 4.949 | 4.293 | 5.538 | 5.209 | 5.201 | 4.597 | 5.173 | 5.060 | 5.034 | 4.554 |
| 5.492 | 5.651 | 4.759 | 4.069 | 3.137 | 4.544 | 3.435 | 3.576 | 3.871 | 3.467 | 3.608 | 4.022 | 3.814 | 4.327 | 3.173 |
| 1.062 | 3.828 | 3.103 | 776 | 2.282 | 2.474 | 1.057 | 4.537 | 3.301 | 1.577 | 1.361 | 1.725 | 1.668 | 1.491 | 1.693 |
| 3.167 | 4.084 | 3.520 | 3.048 | 3.120 | 3.387 | 2.412 | 3.135 | 2.884 | 2.150 | 2.746 | 2.722 | 2.515 | 2.945 | 2.115 |
| 7.018 | 6.829 | 6.138 | 4.470 | 5.230 | 4.225 | 4.008 | 4.471 | 3.738 | 5.193 | 4.508 | 4.478 | 4.592 | 4.138 | 3.795 |
| 7.331 | 7.550 | 6.266 | 5.729 | 5.824 | 5.564 | 4.581 | 5.571 | 5.109 | 6.142 | 6.806 | 6.410 | 5.971 | 4.918 | 5.484 |
| 9.157 | 9.087 | 8.727 | 7.119 | 7.042 | 6.282 | 5.994 | 6.626 | 8.420 | 6.564 | 7.405 | 7.586 | 7.740 | 7.782 | 7.148 |
| 10.366 | 10.667 | 10.044 | 7.027 | 6.814 | 6.663 | 6.180 | 7.195 | 7.745 | 6.230 | 6.906 | 8.522 | 7.860 | 8.001 | 6.315 |
| 11.213 | 11.181 | 9.587 | 7.595 | 7.967 | 8.379 | 8.288 | 7.119 | 7.623 | 7.545 | 8.664 | 9.191 | 8.681 | 8.685 | 9.415 |
| 89.587 | 102.310 | 89.621 | 68.714 | 66.716 | 66.504 | 59.668 | 69.356 | 67.036 | 65.819 | 66.236 | 74.246 | 73.396 | 71.853 | 65.416 |

*Skúlatænararnir í Sørvági hava fylgt gjølla við, hvussu oljunýtlsan hevur verið seinastu árini. Talvan vísir mánaðarnar í árinum og januar árið eftir niðan fyri strikuna. Árið1989 varð bygt út og nógv orka brúkt. Í februar 1991 varð teppið til svimjihylin keypt, og tá minkaði oljunýtlsan munandi beinanveg*

## Gott ár hjá Atlantsflog



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, hevur grund til at fegnast um góða úrslitið hjá felagnum*

*mynd: Edvard Joensen*

**Á 15 ára degnum hjá Atlantsflogi leggur nevndin næstbesta roknskapin nakrantíð hjá flofelagnum fram**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Árið í fjør royndist væl hjá Atlantsflogi. 12 milliónir lupu av, sigur nevndin, sum legði roknskapin fram í gjár.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog sigur, at hóast framgongdin í ferðafólka-talinum einans var eitt prosent í mun til árið fyri, gjørdist yvirkskotið hjá felagnum 18 prosent størri.

Eginognin hjá Atlantsflogi er 105 milliónir krónur, og felagið er nú væl fyri, sigur stjórin. Langfreistað skuld er 100 milíónir, og slakar 70 milliónir krónur liggja á kistubotninum.

Hóast einki oljuvirksemi var í Føroyum í fjør, sum Atlantsflog hevði sett ávísar vónir til, og flogferðslan úti í heimi er í djúpari kreppu, metir nevnd og stjórn í Atlantsflogi úrslitið nøktandi, sigur stjórin.

Tað eru seliga tvey ting, sum Magni Arge, stjóri, metir sum grundarlag undir góðu gongdini hjá felagnum. Tey eru trúgvu viðskiftafólkini og fúsu starvsfólkini hjá felagnum, sum ikki fara av vegnum fyri at taka eitt tak.



# Fær ongar avleiðingar fyri Páll á Reynatúgvu

**Tað fær helst ongar avleiðingar fyri Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann, at fleiri leiðarar í heimarøktini herfyri brádliga søgdu upp, mestsum í senn. Løgmaður sigur, at tað ber ikki til at gera eina sak burtur úr hvørjari einasti uppsøgn**

HEIMARØKTIN
*Áki Bertholdsen*



*- Tað ber ikki til áleggja almennum starvsfólki, at tey ikki skulu siga upp. Er er nakað í skipanini, sum ikki virkar, eiga vit at royna at fáa tey at virka betri og tað eru fyrst og fremst hesi viðurskifti, sum Løgmaður tekur upp, sigur Anfinn Kallsberg.*

-Tað ber ikki til at gera ein sak burturúr hvørjari einastu uppsøgn. Og tað ber heldur ikki til at áleggja almennum starvsfólki, at tey ikki skulu siga upp.

Tað skilst á løgmanni, at uppsagnirnar á heimarøktini fara ikki at fáa avleiðingar fyri Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann í almannamálum.

Men tað merkir ikki, at onki verður gjørt við málið tí tað verður tað, sigur løgmaður.

Hann sigur eisini, at felagið Sinnisbati fer at fáa svar frá løgmanni uppá áheitanina, sum felagið sendi honum fyri fyri fimm vikum síðani.

Men nær hann fer at svara teimum veit hann ikki.

Løgmaður sigur, at hann hevur havt málið til viðgerðar saman við landsstýrismannin í almannamálum.

- Vit royna at fáa greiði á, hvat liggur í málinum og hvat skal gerast framyvir. Sostatt hevur løgmaður kannað malið.

- Men tað ber ikki til at gera stórar kanningar í verk um hvørt einasta mál, ið tekur seg upp, tí so gera vit ikki annað. Og hetta er eitt mál, sum løgmaður hevur reist mótvegis landsstýrismanninum og hevur kannað tað saman við honum.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað, sum hann skal viðgera saman við landsstýrismanninum, er at rammurnar og reglarnar í almennu fyrisitingini verða so tryggar sum gjørligt , so at fyrisitingin verður so effektiv sum gjørligt.

Hann sigur eisini, at í hesum málinum, eins og í øðrum málum, er niðurstøðan í málinum púra greið. Og hon er altíð, at tær reglur og skipanir, sum eru galdandi, skulu haldast og tað er eitt aðalmál at tað skal verða tryggleiki og støðufesti í almennu umsitingini.

Og tað eru hesi viðurskifti, sum hann hevur viðgjørt saman við landsstýrismanninum.

- Tí eru mál av bygnaðarligum slagi, sum hesi, altíð afturvendandi, tí vit skulu altíð stremba okkum eftir at bøta um støðuna.

Men tær tríggjar, fýra ítøkiligu uppsagnirnar í heimarøktini vil hann ikki siga so nógv um.

- Eg fari ikki at siga nakað um viðurskifti ímillum einstøk starvfólk og almennu myndurgleikarnar. Men uppsagnirnar eru eitt mál ímillum tey, sum hava sagt upp og tann myndugleika, tey arbeiða undir. Í so máta er hetta málið ikki øðrvísi enn so nógv onnur mál og tað ber ikki til at gera eina sak burturúr hvørjari einastu uppsøgn.

- Hetta er ein avgerð, sum nøkur almenn starvsfólk hava tikið og hetta er ikki eitt mál, sum løgmaður hevur nakra sum helst ávirkan á. Tað, sum løgmaður skal tryggja, er, at galdandi reglur verða fylgdar.

Hetta fær sostatt ikki nakrar avleiðingar fyri Páll á Reynatúgvu?

- Hjá fjølmiðlunum er tað soleiðis, at stingur eitt mál seg upp, skulu høvd rúka. Tað, sum hetta snýr seg um, er, at er nakað í skipanini, sum ikki virkar, eiga vit at royna at fáa tey at virka betri. Tað er hetta, sum hevur størstan týdning og tað eru fyrst og fremst hesi viðurskifti, sum Løgmaður tekur upp, sigur Anfinn Kallsberg.

### Álvarsmál

Tað eru nú fimm vikur síðani at felagið Sinnisbati staðiliga heitti á løgmann um at kanna málið eftir at tríggir leiðarar í heimarøktini søgdur upp ísenn.

Seinni hevur so eisini eitt fjórða starvsfólk sagt seg úr starvi.

Sinnisbati sigur, at uppsagnir í felag boða frá, at alt ruggar ikki rætt. og tí heitti felagið staðiliga á løgmann um at kann málið og at fáa øll viðurskifti greið, áðrenn nýggj fólk verða sett so at trupulleikarnir ikki taka seg uppaftur.

Uppsagnirnar fara bæði óbeinleiðis og beinleiðis at raka tey sinnisveiku og tí tekur Sinnisbati hetta sum eitt álvarsmál.

Og felagið heldir, at samskipaðar uppsagnir av hesum slagi boða frá álvarsligum trupulleikum.

Umframt Sinnisbata, hava fimm økisleiðarar í heimarøktini gjørt vart við seg í bløðunum um uppsagnirnar.

Og teir meta støðuna so álvarsliga, at í ringasta føri kann hetta hava við sær, at heimarøktin sindrast.

# Stuðul til virki í útjaðaranum skerjast 40% í einum høggi

**– Samgongan gongur í ógvuliga smáum skóm, tí hetta er ein positivur trupulleiki, heldur Henrik Old, løgtingsmaður**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*

Nú verður flutningsstuðulin til virki kring landið skerdur heili 40%.

Tað upplýsir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Og gongst sum landsstýrismaðurin ætlar, verður tað longu nú, frá týsdegnum 1. apríl, at stuðulin verður skerdur.

Tað er Henrik Old, løgtingsmaður, sum hevur biðið landsstýrismannin fortelja fiskavirkjunum kring landið, hvat tey hava at halda seg til, tað, sum eftir er av árinum.

– Flutningsstuðulin hevur verið 3,5 milliónir um árið, men í ár skerdi meirilutin av Løgtinginum stuðulin niður í 2,5 milliónir. Samstundis varð gjørt vart við, at tað skuldi lógarbróting til fyri at tað skuldi bera til at halda játtanina.

Men nú eru ein fjórðingur av árinum farin, og enn er ongin lógarbroyting komin og Henrik Old vildi tí hava landsstýrismannin at greiða frá, hvar virkini flóta, tí tað bar ikki til at arbeiða, tá ið ein alt spurningurin um flutningsstuðulin hekk í leysum lofti.

Flutningsstuðul verður latin fiskavirkjum kring landið til at flyta fisk fyri til og frá virkjunum.

Jacob Vestergaard er samdur í at tað er ikki meiri enn rímuligt, at virkini fáa at vita, hvørjum treytum tey hava at arbeiða undir.

– Og fyri at játtanin skal halda, nú hon er skerd, verður neyðugt at seta nýggja kunngerð í gildi og hon kemur væntandi í gildi nú, fyrsta apríl.

– Hann sigur, at mett verður ein millión er longu brúkt av játtanini.

– Og nú so langt er útliðið, verður neyðugt at skerja stuðulin heili 40% tað, sum eftir av árinum, fyri at játtanin skal halda.

Í hesum sambandi verður roknað við, at flutningurin verður tann sami í ár, sum hann var í fjør.

*Fyri at fáa játtanina at halda, verður neyðugt at skerja flutningsstuðulin til fiskavirkini í útjaðaranum munandi. Skerjingin kemur longu í gildi týsdagin 1. apríl*



Jacob Vestergaard vísti eisini á, at hann hevði fingið eitt álit, har mælt verður til, at stuðulin heilt verður avtikin.

– Eitt uppskot var, at vinnan sjálv setti onkra skipan í verk, sum javntsetir øll virki í landinum. Men á fundi við ráfiskakeypara og -seljarafelagið, vóru boðini, at tað bar ikki til hjá vinnuni at semjast um eina slíka skipan.

### Øll virki javntsetast

Í hesum sambandi minti Hergeir Nielsen á, at táið Løgmaður umsat fiskivinnumál eitt skiftið, gjørdi hann púra greitt, at endamálið var, at øll virkið skuldu setast javnt so at onki virki var verri fyri í kappingin enn eitt annað virki.

– Orsøkin til at stuðulin varð skerdur, var, at nýggjar vørur vóru komnar uppí part at fáa stuðul, men at ætlanin var at fáa tær burturúr skipanini aftur.

Jacob Vestergaard sigur, at skulu tær nýggju vørurnar ikki longur fáa stuðul, má lógin broytast og tað var hann sinnaður at viðgerða politiskt.

Henrik Old helt, at 40% var ein ógvuliga stór skerjing. Men hann vísti eisini á, at ongar vørur vóru komnar upp í part at fáa studning, uttan at samgongan hevði tikið tær uppí.

Hann helt, at samgongan gekk í ómetaliga smáum skóm, tí hetta var ein positivur trupulleiki.

– Vit eru í tí hepnu støðu, at vit hava nógvan fisk at flyta og tí er tað løgið, at samgongan skal síggja flutningsstuðulin sum ein trupulleika. Talan var um ógvuliga smáar upphæddir, sum tryggjaði arbeiðið í útjaðaranum og tí vinnulív er høvuðsgrundarlagið undir livilíkindunum í útjaðaranum.